## VIÐMERKINGAR

# Svar til grein frá Therese Kreutzmann

**Oda Andreasen**



Á ferdavinnufundinum í Vágunum legði eg upp til, at kunningarstovurnar skulu vera meiri komercielIar og eitt nú sjálvar taka sær av bóking av hotellum, summarhúsútleigan v.m. Eg meini ikki at tað er rættur hugburður, at kunningarstovurnar einans skulu taka sær av vørumenning. Hetta er kostnaðarmikid og ferðaskrivstovurnar eru mær vitandi ikki við til at fíggja hetta! Onkustaðni skal peningurin til fígging koma frá og her leggi eg upp til, at hetta kann gerast við at kunningarstovurnar bíleggja alla gisting, útferðir v.m. í teirra øki, fyri at fíggja vørumenning, tænastu v.m.

Sjálvandi kunnu kunningarstovurnar ikki fara sjálvar út og marknaðarføra Føroyar, hetta er ikki peningur til. Marknaðarføring kann gerast saman við Ferðaráð Føroya og flutningsfeløgunum Smyril Line og Atlantic Airways, sum frammanundan eru sera sjónlig eitt nú í Danmark og sum hava ferðaskrivstovur í Danmark. Úttanfyri Danmark hava Atlantic Airways og Smyril Line eisini eitt ótal af agentum til at røkja hesa uppgávu.

Ferðaskrivstovunar og flutningsfeløgini Smyril Line og Atlantic Airways áttu at hugsa at fingið felags Brand fyri Føroyar í marknaðarføringini og lýsingartiltøkum í útlandinum fyri at fáa størri effekt.

Eg haldi, at tað er flott, at Therese Kreutzmann hevur latid upp egna ferðaskrivstovu í Danmark, har hon selur ferðir til Føroyar, tað kunnu vit øll fegnast um. Men við teimum møguleikunum sum m.a. eru á internetinum í dag, meini eg als ikki, at kunningarstovurnar skulu halda seg aftur við at hugsa meira kommercielt, so fígging kan fáast til vega, at veita ferðafólkunum sum Therese Kreutzmann sendir til Føroyar eina góða tænastu.

# Fair Play, takk

**Við dómarakvøðu**
*Dómarafelagið, Eyðun Samuelsen, formaður*



Eftir dystin millum Sølj-una og Stjørnuna seinasta mikukvøld, hevur nakað av orðadrátti staðist av leiklutinum hjá ávíkavist dómara og venjaranum hjá Stjørnuni í dystinum.

Dómaralfelagið fer sjálvandi ikki at leggja seg út í, hvørjar viðmerkingar ymsu partarnir gera í fjølmiðlunum. Men eitt mark má tó vera fyri, á hvørjum støði viðmerkingarnar verða gjørdar.

Í Rás2 sigur venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, at »...at ein leikari hjá Stjørnuni eftir dómarans meting skal hava sagt okkurt, sum ikki hóskar seg á einum vølli«. Hetta er beinleiðis at sáa iva um trúvirði hjá dómarunum. Tá takkað verður fyri dyst, standa dómararnir beint har, sum spælararnir hittast. Tí er talan ikki um nakra meting hjá dómarunum, men um eina konstantering av tí, sum farið er fram. Tí er tað púra burturvið, at ein venjari, sum ikki stendur líka nær, skal sáa iva um tað, sum dómarin hevur eygleitt. Og tað er her, at vit vilja biðja um Fair-play.

Og tað skal verða sligið heilt fast, at tað til eina og hvørja tíð eru dómararnir, sum gera av, hvussu dømt verður í dystunum. Sjálvandi vilja mistøk koma fyri í einum dysti. Men vit í Dómarafelagnum vilja altíð arbeiða fyri at betra um støðið á dømingini í Føroyum.

At ein venjari beinleiðis hóttir við at taka lið av vøllinum, um ein ávísur spælari ikki verður revsaður fyri ein tilburð, er fullkomuliga burturvið og hoyrir onga staðni heima. Serstakliga ikki, tá sami venjari samstundis er bæði landsiðsvenjari og limur í starvsnevndini hjá HSF. Sjálvsagt hava hesir sessir einki við venjarastarv hansara at gera, men hesir sessir føra eisini eina ábyrgd við sær. Millum annað tað at sýna vanliga fólkaligheit. Tað hevur Svein Rógvi Nielsen als ikki sýnt í hesum førinum. Og at hann eftirfylgjandi ákærir dómararnar fyri at »vera farnar í summarfrí« má sigast at vera langt úti.

Heldur enn at fara í miðlarnar at skapa óneyðugt rok um ein dyst, sum slettis ikki var so rokmikil, kundi hann kontakta antin dómarafelagið ella dómararnar sjálvar um sína ónøgd.

# Rosenkransen og katolsk tro

**Lars Messerschmidt**
*præst for den katolske menighed i Tórshavn*



Jeg vil først takke Thorbjørn Brochs for hans svar i Sosialurin den 31. marts på et læserbrev den 6. oktober 2004, der anbefaler at bede rosenkransen, sådan som Jomfru Maria opfordrer til i åbenbaringerne, der finder sted i Medjugorje i Bosnien. Takken gælder først og fremmest hans upolemiske måde at skrive på, dernæst at han giver mig lejlighed til at rette nogle almindelige misforståelser. Hans indlæg berører to vigtige spørgsmål: Hvordan lærer Jesus os at bede og hvordan skal man forstå sætningen 'uden for Kirken ingen frelse'?

Vi er enige om, at Jesus forbyder os at "lade munden løbe, som hedningerne gør, fordi de tror, at de bønhøres for deres mange ord" (Matth 6,7). Katolikker tror ikke, at de bønhøres, fordi de bruger mange ord. De tror, at Gud hører enhver bøn, der kommer fra hjertet. I katolsk tradition kender vi en form for børn, der kaldes 'ordløs bøn' og Paulus kender til en bøn, der kaldes 'tungetale', og han takker endda for, at han taler mere i tunger end korintherne (1. Kor 14,18). 'Tungetale' er ifølge Paulus bl.a. 'bøn i ånden'. At mange og indtrængende bønner kan være nødvendige, siger Jesus selv i lignelsen om enken og den retfærdige dommer (Luk 18,1-8).

Rosenkransen, der normalt består af en kæde med 55 perler fordelt i fem grupper, er først og fremmest en meditation over Jesu liv fra undfangelsen til hans optagelse i himlen. Meditationen foregår ved, at man andægtigt beder Fadervor på den første perle, derefter følger englens hilsen til Maria: 'Hil dig Maria_.' og Elisabeths hilsen til Maria: 'Velsignet er du blandt kvinder _' (Luk 1,29 + 42). Dette 'Ave Maria' gentages 10 gange, samtidig med at man mindes et af Kristi mysterier, f.eks. undfangelsen, fødslen i Bethlehem, døden på korset og opstandelsen. Man kan naturligvis meditere over Jesu liv på andre måder, og det gør man også, men rosenkransen er slået igennem som den mest folkelige måde at meditere på. De ord, der siges er bibelske (Fadervor og Hil dig Maria). De egner sig i særlig grad til at lede tanken hen på Jesu liv. Man kan sige, at hans liv er substantielt indeholdt i de to bønner. Når man beder bønnerne et vist antal gange, er det alene for at fastholde opmærksomheden på en bestemt hændelse i Jesu liv, det er absolut ikke for at gøre sig fortjent til bønhørelse eller frelse. Rosenkransen, bedt i den rigtige ånd, falder altså ikke under Jesu dom i Matth. 6,7. Hermed vil jeg naturligvis ikke påstå, at der ikke findes katolikker, der beder rosenkransen på "hedensk maner". Men vi må vel alle ransage vort hjerte og spørge os selv, om vi altid 'tilbeder Faderen i ånd og sandhed' (Joh 4,23).

Hvad angår læresætningen: 'uden for Kirken ingen frelse', stammer den fra kirkefaderen Origines (185-253). En anden kirkefader, Cyprian (210-258) skriver: "Den, der ikke har Kirken som moder, kan ikke have Gud som Fader". Disse udtryk forstås bedst på baggrund af et andet oldkirkeligt udtryk: 'totus Christus', den hele Kristus, dvs. Kirken som Kristi legeme. Ifølge Paulus er Kristus og Kirken ét legeme (1. Kor. 12,12-13). 'Udenfor Kirken ingen frelse' betyder altså det samme som 'udenfor Kristus ingen frelse'. Den katolske Kirkes katekismus forklarer det således: "Al frelse kommer fra Kristus, hovedet, gennem Kirken, som er hans legeme" (846).

Kristus har forpligtet sin Kirke til at forkynde Evangeliet for alle folkeslag og døbe dem, der kommer til tro, for at de kan frelses (jfr. Matth 28,19 og Mark 16,15-16). Dåben, som Kirken administrerer, er nødvendig til frelse for dem, der kommer til tro på Evangeliet, men hvad med dem, der aldrig har hørt Evangeliet? Kan de ikke blive frelst? Jesus svarer på dette spørgsmål i Matth 25, 31-46: De unåede hedninger bliver frelst af Kristus, hvis de har tjent ham i 'de mindste'. Katekismen siger det således: "Gud har bundet frelsen til dåbens sakramente, men selv er Han ikke bundet af sine sakramenter" (1257). Men det er stadigvæk Kristus — den 'hele Kristus', der frelser.

Den kristne dåb giver ethvert menneske del i Kirkens fællesskab, om end på en ufuldstændig måde. Således vedkender den katolske Kirke sig et fællesskab med alle døbte, også udenfor Kirkens synlige fællesskab. Hvis en ikke-katolsk kristen ønsker at konvertere til den katolske Kirke, gentager man derfor ikke dåben, men forudsætter den. En konversion kalder vi en optagelse i Kirkens fulde fællesskab. En fuldstændig delagtighed i den katolske Kirkes fællesskab forudsætter, at man deler Kirkens tro fuldtud og modtager det særlige sakramente, som kaldes firmelse ('konfirmation'), i hvilket man bliver salvet med Helligånden, og nadverens sakramente. For katolikker udgøres den fulde indførelse i Kirkens fællesskab af tre sakramenter: dåb, firmelse og nadver. Men allerede dåben skaber et kirkeligt fællesskab på basisniveau og dermed en grundlæggende enhed.

Jeg håber, at det af ovenstående er blevet klart, at katolikker helhjertet kan sige med apostlen Peter: "Der er ikke givet mennesker noget andet navn (end Jesu navn) under himlen, som vi kan blive frelst ved" (ApG 4,12) og med apostlen Paulus: "Der er én Gud og én formidler mellem Gud og mennesker, mennesket Kristus Jesus" (1. Tim 2,5). I denne bekendelse kan vi mødes med alle kristne.

*Framhald av síðu 10*

betur hugskot, at skipa umstøðurnar hjá Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya soleiðis, at møguleiki verður fyri at takað tvey hold av lesandi inn um árið. Hettar kundi verið gjørt til tørvurin av sjúkrarøktarfólkið er nøktaður. Síðan kundi upptøkan av lesandi verið tillaga aktuellu støðuni.

Viðvíkjandi tilgongdini av lesandi til skúlan, so er ongin trupulleiki verið fyri at kunna manna tvey hold. Sum er sleppa ikki øll, sum søkja, inn. Ístaðin verða tey at fara av landinum fyri at fáa sær hesa útbúgving - sjá Sosialin 30.mars

At enda kann nevnast, at ein grundgeving fyri at vit skulu hava hesa útbúgvingina í Føroyum, er at Danmark hevur hesa útbúgving. Tey hava, so vil eg eisini hava!!!

Trupulleikin er bara, at vit eru færri og smærri til at fíggja fleiri útbúgvingar, og tá pengapungurin/krubban er tóm, so býtast rossini. Úrslitið verður tá, at hvørgin útbúgvingin verður góð ella fær nøktandi karmar at virka undir.